35
DOT OYRAVERND
Til eina og hvørja støðu
Líkamikið hvar tú upplivir óljóð, eigur tú at verja teg.
*Tak ábyrgd fyri tíni hoyrn*
Størri gagn
Ansa eftir tíni hoyrn og fá meiri burtur úr arbeiðsdegnum.
*Formstoypt hoyrivernd økir um títt virkni og trivnað*
Fært tú nokk svøv?
Mistur svøvnur ávirkar tína heilsu og títt sinni
*Hvussu nógvar tímar av svøvni missir tú?*
PHONAK life is on
Ring og bílegg tíð til eina ókeypis hoyriroynd
Hoyrnin, N. Finsensg. 51, Tórshavn, tlf. 321731
HOYRNIN
www.hoyrnin.fo
Sosialurin 341800

# McGavin í miðbýnum og SMS

Størsta frisørsalongin í høvuðsstaðnum er McGavin við salongum í miðbýnum og í SMS.

Tað er Paula McGavin, sum eigur og rekur báðar salongirnar.

Frisørsalongin McGavin er ein gomul og kend fyritøka í høvuðsstaðnum. Søgan hjá salongini gongur aftur til 1968, tá Tóta Sørensen byrjaði við síni fyrstu salong, ið nevndist Carmen og seinni skifti til Salong Tóta.

Í 2005 yvirtók Paula McGavin salongina í M. Heinasonargøtu, sum skifti navn til Salong McGavin. Síðan 2007 hevur McGavin eisini havt eina deild í SMS.

McGavin umboðar Wella Professionals, sum er heimsins best kenda merki innan hárfríðkan. Í nærum 130 ár hevur Wella Professionals støðugt ment seg í tøttum samstarvi við hárfríðkanarfólk og hárfríðkanarstovur. Í hesum sambandi skipar McGavin á hvørjum ári fyri skeiðum, har fólk frá Wella Professional koma til Føroya og greiða frá nýggjasta mótarákinum. Eisini eru frisørar hjá McGavin á skeiði hjá Wella í útlandinum fyri altíð at vera dagførdar við nýggjasta hármótanum.




Tað nýggjasta hjá McGavin er húðrøktarstovan, har kosmetologurin Súsan Benjaminsen stendur fyri viðgerðunum við t.d. økologisku produktunum frá John Masters Organics.

Salongirnar hjá McGavin hava tilsamans 15 fólk í starvi. McGavin hevur eina on-line skipan, har tað ber til at bíleggja sær tíð til frisør ella kosmetolog á heimasíðuni www.mcgavin.fo

Paula McGavin sigur, at í sambandi við jólini hava salongirnar nógv góð gávuhugskot sum t.d. tey ymisku produktini hjá Wella og gávukort til frisør ella kosmetolog.

